# Hetta er mín jólasangur

## Monika Stauss Joensen: *Wer springt so durs Stedtli?*

– Hetta her er ein jólasangur á sveisiskum og uttan hann, vóru míni barnajól helst ikki so sum tey áttu at verið. Sum mær dámdi sangin væl, og ikki minst nú, ið eg eri vaksin, sigur Monika Stauss Joensen í Leirvík.

Tað rørdi okkurt innast í hjartanum hjá mær at syngja um hirðarnar og um eingilin. Eg sá hann fyri mær í míni barnafantasi, hvussu hann í fínum snjóhvítum klæðum sveimaði frá himmalinum niður á jørðina.

Um hann fór til bygdina, har sum nógv fólk høvdu samlað seg, har rokaligt var og eingin ivast í, at veitslan var uppá tað besta – nú familjurnar møttust aftur – um eingilin kom her, var tað rættiliga forstáiligt: Tað vóru jú stór tíðindi, sum hann hevði at bera fólki.

Men nei, hann valdi at fara hagar sum myrkt var, – har sum nakrir seyðamenn, sum kanska ikki vóru so høgt virdir í samfelagnum, sótu og passaðu eitt seyðafylgi. Helst vóru klæði teirra skitin, luktaðu av eldi og seyði, og sótu í einsemi og í myrkri. Áh, sum tað altíð hevur rørt meg, at eingilin fór fyrst hagar .......

Um eg sjálv elski at hugna um í jólatíðini og alt stásið rundanum við at baka, klippa, finna fittar gávu o.s.fr., so komi eg oftani at hugsa um tey sum bera sár og tungar byrðar í hjartanum – tey sum uppá ein ella annan máta sita í myrkri.

Veit eg frá mær sjálvari, at ofta, akkurát í hesum døgum sum tað er minst ynskt, sníkja kenslurnar av heimlongsli til har røturnar eru, seg fram. Og ikki er óvanligt, at meðan kirkjuklokkurnar ringja jólini inn, so rennur eitt tár eftir kjálkanum.

– Men so vilja vit fegnast um, at frelsarin er føddur, sigur Monika Stauss Joensen.

**BYRÐAR**

***– Um eg sjálv elski at hugna um í jólatíðini, so komi eg oftani at hugsa um tey sum bera sár og tungar byrðar í hjartanum – tey sum uppá ein ella annan máta sita í myrkri, sigur Monika Stauss Joensen í Leirvík***



### Wär springt so durs Stedtli?

(Hóast skrivaða málið í Sveis er týskt,
so finst okkurt smávegis sum er skrivað á "sveisiskum")

Wer springt so durs Stedtli?
*Hvør er tað sum rennur gjøgnum bygdargøtuna?*

Wer springt so durs Stedtli, wer mag das wol sy?
He, d Hirte, vom Fáld her gónd d Gasse dury.
*Hvør man tað bert vera, sum so seint um náttina rennur eftir gøtuni í lítlu bygdini? Tað eru hirðarnir frá markini sum ganga her.*

Was wánds ácht go gschauá, was hánds ácht vernaa?
Si singed und jublád, de Heiland isch da!
*Hvat man tað bert vera sum teir vilja hoyra og síggja? Teir syngja og frøast, tí frelsarin er føddur.*

En lieblichá Àngel, de hát i dá Nacht,
Voll Freudá die Botschaft, de Hirtá grad pracht.
*Mitt á nátt kom ein friðfullur eingil at bera*
*hirðunum á markini gleðiboðskapin.*

Drum springd die Mane und jublád so froh,
Mir singed mit iná, de Heiland isch cho.
*Hetta er orsøkin til at hesir menn eru so ovurfegnir. Og saman við teimum vilja vit syngja at frelsarin er føddur.*

# Jól hjá Demmus í SMS

Í SMS hevur Demmus eitt stórt úrval av skóm og stivlum í øllum støddum til børn og vaksin.

Demmus er eitt kent navn í handilslívinum í Havn og ein fyritøka við langari søgu. Navnið Demmus stavar frá tí tíðini, tá Nicodemus Joensen, vanliga nevndur Demmus, í 1920-unum yvirtók skósmiðjuna og skógvahandilin hjá Christian Holm Jacobsen í Steinagøtu í Havn. Seinni yvirtóku onnur handilin, sum var í Steinagøtu til síðst í 70-unum, tá handilshúsini vórðu tikin niður, og handilin flutti inn í SMS. Í dag er Demmus ein av stóru skógvahandlunum í høvuðsstaðnum.

Elisabeth Egholm, leiðari í Demmus, sigur, at tey leggja stóran dent á at hava skótoy til øll - bæði stór og smá í ymiskum prísklassum. Demmus selur harraskógvar av merkjum sum t.d. Rieker, Camel, Vagabond og André, og kvinnuskógvar av merkjum sum Wonders, Bumper og Billi Bi. Til ungar kvinnur selur handilin merkir sum t.d. Duffy, Blink, Bronx og Kawasaki eins og barnaskógvar av merkjunum Kennedy, Kanguroos, Bisgaard og Super Fit. Til tey ungu selur Demmus merkini Boras, DC og Kawasaki. Umframt nógv onnur merkir




Sum nakað nýtt er Demmus nú farin at selja leðurjakkar og vestar til kvinnur og taskur av merkinum OnStage, eins og taskur av øðrum merkjum. Vit leggja dent á ikki at keypa tey ymisku sløgini av leðurjakkum, vestum og taskum í stórum nøgdum fyri at verja tey sum keypa, soleiðis at ikki ov nógv ganga í klæðum av sama slagi og eins taskum, sigur Elisabeth Egholm, sum leggur afturat, at øll eru vælkomin inn í handilin at síggja okkara stóra vøruúrval.